# Jesus – offur, jødi ella...?

**KRISTIAN HANSEN**
Klaksvík
cand.theol.



**Hans Andrias Sølvará hevur í Sosialinum 20. oktober eitt aftursvar til mína viðmerking um gudfrøðina hjá amerikumanninum Marcus Borg**

Í míni viðmerking hefti eg meg bert við eitt: Eg afturvísti gudfrøðisliga uppáhaldinum hjá Borg um, at bótardeyði Jesusar fyri heimsins synd, ikki finst í Markusar evangelium (Mk). Hetta er ikki fallið í góða jørð hjá Sølvará. Í svari sínum sigur Sølvará, at hann metir seg sum leikmann, neyvan føran fyri at svara, men letur ístaðin tann "kompetenta Borg professara tala fyri seg." So kunnu fólk sjálvi velja, um tey góðtaka Dr. Borg ella Kristian Hansen. Sjálvur stendur Sølvará uttan fyri síðulinjuna.

**At verja borg við Borg**

Sølvará hevur onga viðmerking til tað, sum eg afturvísti. Letur ístaðin Marcus Borg endurtaka síni mistøk, og tað berandi í grundgevingunum hjá Sølvará er akademiska prýðið hjá Marcus Borg. Innihaldið hjá Borg tykist ikki hava týdning, tí "Borg er professari, ógvuliga kompetentur..." Logikkurin í skrivingini hjá Sølvará tykist vera hesin: Summi trúgva tí, sum stendur í koranini, tí tað stendur í koranini. Summi trúgva tí, sum stendur í bibliuni, tí tað stendur í bibliuni. Sølvará trýr tí, sum Marcus Borg sigur, tí Marcus Borg sigur tað. Eg havi trupult við at síggja nakað akademiskt háttalag í hesum.

**Meira um "loysigjald"**

Sølvará endurgevur Borg: 'Í bibliuni er grikska orðið "lutron" (loysigjald) altíð brúkt í samband við keyp av trælum ella fangum o.s.fr.'

Tað er rætt, at upprunaliga merkingin av orðinum "loysigjald" er, at ein upphædd varð goldin fyri at fáa ein krígsfanga ella træl leysan. Men tá Sølvará saman við Borg tvíheldur um, at "loysigjald" altíð hevur hesa merking, so er tað beinleiðis ósatt.

Í GT og jødiskum samanhangi varð "loysigjald" nýtt í mongun viðurskiftum. Í fleiri førum er meginreglan "lív fyri lív" galdandi (t.d. 4 Mós 24,18 og 3 Mós 5,1-26). Tann, sum hevur tikið lív, skyldar at geva sítt egna lív. Ella tann, sum vegna synd hevur drigið skyld oman yvir seg, skyldar Gudi sítt lív. Í slíkum førum varð loysigjaldið nýtt sum eitt endurgjald. Sostatt broytist orðið "loysigjald". Aðrir týdningar leggjast afturat orðinum sum tíðin gongur, og týdningurin er ymiskur, alt eftir hvørjum kontekstinum er. Hetta er púra vanligt í øllum livandi málum. Tí er tað neyðugt at finna fram til, hvønn týdning "loysigjald" hevði, tá Markus nýtti orðið.

**Lakmusroyndin**

Við hesum staðfestingum kunnu vit venda okkum til Mk 10,45 við bibliutulkarans lakmusroynd. Merkir "loysigjald": bert ein upphædd til at keypa trælir og fangar leysar við, ella fevnir "loysigjald" eisini um tankan um staðgonguoffur? Hvør merking hóskar best við kontekstin og við restina av NT?

Fyrst er at siga, at Mk 10,32-45 er ein heild. Vv. 32-34 er "pallsetingin". Í pallsetingini fyriboðar Jesus sín deyða og uppreisn. Í hesum konteksti verður sagt, at Jesus gevur "lív sítt sum loysigjald fyri mong." Tí er talan ikki um eina vanliga upphædd í naturalium ella peningi, men við egnum lívi.

Í øðrum lagi er at siga, at tá vit hava GT í huga og jødisku fatanina av "loysigjaldi," sum liggur undir her, so er greitt talan um gudfrøðisligan tekst. Harumframt verður tankin um staðgonguoffrið enn greiðari við orðinum "loysigjald fyri mong", har orðið "fyri" (gr. anti) merkir "í staðin fyri"; talan er sostatt um, at Menniskjasonurin kemur í staðin fyri tey mongu. Og hann doyr í staðin fyri sek menniskju.

Og taka vit eisini ta sannroynd við, at Jesu staðgonguoffur verður beinleiðis staðfest í eini røð av øðrum tekstum í NT, so er tað ikki haldgóð vísindi, at hava eina so grundleggjandi skepsis mótvegis offurtankanum í Mk.

Jú, tað ber til at petta tekstin sundur, taka "loysigjald" út úr kontekstinum, og halda seg til eina orðabókatulking sum sigur, at upprunatýdningurin er "at leyskeypa trælir við peningi". Men tá verður úrslitið tað mest ónátúrliga. Tá hóskar versið ikki við kontekstin, ei heldur við Mk, hini evangeliini ella bibliuna yvirhøvur. Tá hóskar tað bert við sjónarmiðið hjá Borg og hansara fáu líkum, uttast á tí atfinningarsama veinginum.

**Ein løgin kjakmentan**

"Svarið" hjá Sølvará til mín hevur, sum sagt lítið og einki við mína grein at gera, men er afturvendandi retorikkur um bibliukritikk. Hansara skriving er merkt av ótolsemi og einum sera niðrandi tóna ímóti mær. Hetta noyðist ein kjakmeistari helst at gera, tá hann ikki vil viðganga, at hann er farin skeivur. Lat tað so fara.

Tað er áhugavert, at Sølvará nú viðgongur, at hann bert er ein "áhugaður leikmaður." Í skriving hansara havi eg annars altíð fingið ta fatan, at hann er serfrøðingur á nærum øllum fakøkjum. Løgið kortini, at ein "áhugaður leikmaður" dittar sær at gera av, hvør gudfrøðingur og professari er kompetentur og ikki. Serliga tá hann megnar lítið annað enn at endurgeva hansara professarar, sum hann so rósar til skýggja. Eg undrist.

# Rætta ætlanin við Føroyagrunninum frá 1971

**JÓGVAN VIÐ KELDU**
fyrrverandi borgarstjóri, landsstýris- og løgtingsmaður



**2. partur**

**Fyrrverandi løgmaður og fylgisneytar ætlaðu at fáa fatur á JFK-samtakinum. Tað hevði verið ólógligt, um tað eydnaðist**

Sum nevnt í mínum fyrsta parti, so er grundarlagið undir Føroyagrunninum frá 1971 fæ, sum upparbeitt hevur verið í dugnaskapi í mong áratíggjur í Kjølbro fyritøkuni við heimstaði í Klaksvík, sum tó fekk týdning fyri alt landið.

Skilligt er, tá ein lesur viðtøkurnar hjá Føroyagrunninum frá 1971 og kunngerð frá február 1982, at rásin er, at upparbeidda ognin, eisini framhaldandi eigur at verða nýtt til endamál í heimstaði grunsins, tað sæst m.a. eisini út frá, at bæði Klaksvíkar Kommuna, fakfeløg og tann í innhandlar fisk hjá J.F.K. (Kósavirkinum), hava sínar instillingarábyrgdir yvirfyri landsstýrinum til nevnd o.s.fr.

Hvussu hetta bindur løgfrøðiliga er eitt, men reint moralskt, rætt og sjálvsagt vigar tungt, at øll hesi aktiv eru komin í grunnin frá J.F.Kjølbro í Klaksvík.

"Føroyagrunnurin frá 1971" hevur nevnd, sum er vald eftir ávísum reglum, og hevur ræðisrætt til støðutakanir, tí avger nevndin, hvussu farast kann fram, og tá for-maðurin í grunninum Leif Abrahamsen: "slær fast, at tað verður ikki við pengum úr Føroyagrunninum, at virksemi verður aftur á Kósavirkinum", so eiga vit at minnast til, at nevndin hevur ikki bara ræðisrætt men eisini ábyrgd av, at peningurin verður rætt brúktur og á rætta staði.

**Tá løgmaður leikaði í**

Eg fari at minna á, at í julimánaði í 2005 avgjørdi Føroyagrunnurin frá 1971, at selja Hanus Hansen 67% av JFK-samtakinum, sum eingin ivi skal vera um, var einki meiri enn rætt og nátúrligt, so fyritøkan framhaldandi varð verðandi í Klaksvík.

Út frá hesum sendi táverandi løgmaður Jóannes Ejdesgaard tíðindaskriv, har hann m.a. segði: "Nú Føroyagrunnurin hevur gjørt avtalu um at selja 67% av JFK-samtakinum, harmast Landsstýrið um mannagongdirnar í sambandi við søluna. Gjøgnumskygni vantaði, og einki alment útboð hevur verið, sum gevur øllum javnabjóðis møguleika at keypa...." – Javnbjóðis møguleika at keypa!

Á landsstýrisfundi og fleiri fylgjandi fundum mótmælti eg hesum, tí løgmaður og fylgisneytar ætlaðu at fáa JFK úr Klaksvík. Hetta var bæði ólátað og ómoralskt.

Sjálvandi fari eg ikki at siga, at "Føroyagrunnurin frá 1971" í síni tíð var ognartøka av JFK- samtakinum, har møguleiki kveikist at konvertera lán til partapening, men einki undrar meg.

**Bárður til arbeiðis**

Eftirspælið av orrustuni hjá Jóannesi Ejdesgaard, løgmanni og fylgisneytum var, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum Bárður Nielsen, setti størri arbeiði í verk. Hetta gjørdist drúgvt tilfar við m.a. Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, men teir komu til ta niðurstøðu, har skrivstovustjórin í Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, Jytte Heje Mikkelsen, segði: "Ovennævnte fonde ( Føroyagrunnurin) er privatretlige fonde, og derfor ikke underlagt landsstyrets bestemmelsesret eller offentlig styring".

Hetta, og einki annað, setti punktum fyri álopið á Klaksvík frá løgmanni og fylgisneytum, og Leif Abrahamsen varðveitti starvið.

Tí skilji eg ikki, at ikki hoyrist eitt kvekk frá Klaksvíkar Býráði og løgtingsfólkum úr Norðoyggjum við upplýsingum um moralska ræðisrættin til grunnin, álopini koma at verða framhaldandi, tí hesi ynskja aktivini, um tey so skulu flytast úr Klaksvík.

# Viðmerking til yvirlýsing frá Samtak og Landsfelag Pensjónistanna

*Tíðindaskriv*

Løgtingið viðgjørdi í gjár uppskot frá landsstýriskvinnuni í almannamálum, sum høvdu til endamáls at minka um útreiðslur landskassans. Tað er fallið Samtaki og Landsfelag Pensjónistanna fyri bróstið, at spariuppskotini koma at hava fylgir fyri pensjónistar og fyritíðarpensjónistar. Til hetta hevur landsstýriskvinnan hesar viðmerkingar:

"Tað er ein sannroynd, at fíggjarligu útlitini ikki eru eins bjørt, sum fyri einum ári síðani. Fíggjarlógin fyri 2009 gevur stórt hall, og tí hava øll landsstýrisfólk fingið álagt at tálma útreiðslunum. Uppskotini, ið vóru fyri í gjár, eru bert ein partur av hesum arbeiði.

Tí er tað skeivt at siga, at landsstýrið bert leggur eftir teimum veikastu í samfelagnum. Byrðan er tung at bera, og vit mugu øll lyfta, eisini eg sjálv, hóast eg umsiti eitt økið við fleiri veikum brúkarum. Mín uppgáva er at raðfesta og telva meg fram politiskt til nakrar sparingar. Uppskotini sum vóru fyri í gjár eru tey, sum politisk undirtøka er fyri í samgonguni.

Tá tað er sagt, so vil eg gera greitt, at tá javningin av almannaveitingunum fer úr fýra í trý prosent, so merkir tað ikki, at pensjónistar, fyritíðapensjónistar o. o. fáa minni útgoldið í mun til nú. Útgjaldið *veksur* trý prosent, sum samsvarar við vøksturin hjá vanliga løntakaranum. Eisini hevur økta útgjaldið úr Samhaldsfasta gjørt góðan mun í ár. Sostatt er tað ikki rætt at siga, at pensjónistar og fyritíðarpensjónistar vera fátækari í 2009 enn í 2008.

Haraftrat fáa lægstu fyritíðarpensjónistar eitt hægri útgjald í 2009.

Tað er als ikki mín ætlan, at niðurleggja Tilhaldini, men eg meti at uppgávan verður betur rikin úti hjá kommununum. Leggjast kann aftrat, at skattainntøkurnar av økta útgjaldinum til fyritíðarpensjónistarnar í 2008 og 2009 fella partvíst eisini kommununum í lut. Eitt hugskot kundi verið at ein partur av hesum eyka inntøkum kundu verður nýttar til Tilhaldini.

Landsstýrið arbeiðir miðvíst fyri at fremja batar fyri pensjónistar og aðrar veikar bólkar í samfelagnum. Ein nýggj forsorgarlóg kemur at áseta eitt minstamark fyri uppihaldstørvi – eitt sokallað fátækramark – fyri allar borgarar í Føroyum fyri at tryggja øllum føroyingum eina rímuliga inntøku. Eisini verður arbeitt við einar eldralóg, sum skal tryggja rættindi og tænastur fyri eldri".

**Almannamálaráðið**